# Argjamenn vórðu kløkkaðir

**Men hóast hann tóktist eitt sindur kroystur, so eydnaðist tað Argjabátinum enn eina ferð at vinna øll stigini**

8-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*



*Hóast hart kroystir eydnaðist tað Argjabátinum at vinna á Jóansøku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var eitt sindur av órógv í á Sundalagsstevnuni. Ta ferðina lá Argjabáturin tvørur í startinum. Kortini eydnaðist tað honum at vinna øll stigini, hóast Kvívíkingurin royndi at gera sítt.

Í Vági varð kappast á eitt túsund metrum. Harvið varð lagt upp til, at bátarnir, sum á fyrstu túsund metrunum á fyrru stevnunum hava roynt at argað argjamenn eitt sindur, skuldu fáa høvdið fyri seg, og tað restaði ikki so nógv í, at tað eydnaðist hjá teimum. Men á málinum var Argjabáturin enn eina ferð fremstur. Hann hevur fult stigatal, og tað er einki, sum bendir á, at nakar skal hótta hann í FM kappingini. Um nakar fer at hótta hann í onkrari av teimum trimum kappingunum, sum framvegis eru eftir í hesum róðrarárinum, fer bara tíðin av vísa.

Kvívíkingur og Nevið Reyða hava kappast um plaseringarnar aftanfyri Argjabátin. Hesa ferð fingu hesir báðir bátarnir betri start, enn Argjabáturin fekk. Men eftir startspurtin var Argjabáturin komin upp undir liðina á klaksvíkingum og kvívíkingum, og soleiðis gekk tað eina góða løtu.

Undanfarnu ferðirnar hevur tað víst seg, at tá ið málið hevur verið gott og væl hálv rógvið, so hevur Argjabáturin togað seg framum hinar, og so hevur hann stýrt róðrinum. Soleiðis var tað ikki hesa ferð. Nevið Reyða tóktist hava góðan hug at gera tað gott aftur, at teir á Sundalagsstevnuni ikki megnaðu meiri enn fjórða plássið. Nakrar ferðir stakk Nevið Reyða seg framum hinar, men tað tóktist ikki sum um, at klaksvíkingarnir skuldu fáa høvi at sleppa avstað.

Dygst frammanundan endaspurtinum lætti Argjabáturin sær á, og so tóktist sum um, at tað skuldi ganga, sum tað hevði gjørt undanfarnu ferðirnar. Men klaksvíkingar og eisini kvívíkingar vóru treiskir. Teir hildu tørn. Onkra løtuna vóru teir fremstir, so stóð høgg um høgg, so vóru argjamenn fremstir, og so svaraðu klaksvíkingar aftur.

Á síðstu metrunum megnaði Argjabáturin kortini fyri fjórðu ferð av fýra at vinna seg so mikið framum, at eingin ivi var um, at hann var fremstur og harvið vinnari av teimum sjey FM stigunum. Men munurin var lítil aftur til Nevið Reyða, sum bara var ein skut aftanfyri, og til Kvívíking, sum bara var ein uppaftur minni skut aftanfyri Nevið Reyða.

# Spógvin spruttaði eina løtu



*Blikur vann trygt dreingjaróðurin á Jóansøku*

*Mynd: krf.fo*

**SMen tá ið alt kom til alt, bar tað ongum til at gera nakað við Blik, sum nú av álvara hevur lagt sjógv millum seg og hinar í FM kappingini**

5-MANNAFØR DREINGIR

*Jóannes Hansen*

Í fyrstu FM kappingini í Klaksvík á Norðoyastevnu fyri einum mánaði síðani var Spógvin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ vinnari í kappingini millum dreingjamanningarnar. Síðani hevur gingið minni væl hjá Spógva dreingjunum.

Men leygardagin tóktist tað sum um, at tað rættuliga skuldi fara at glógva aftur. Spógvin legði sera bragdliga fyri, og á tí fyrsta teininum var hann so mikið nógv av einari bátslongd frammanfyri hinar bátarnar, at møguleiki var fyri, at hann skuldi taka fremsta plássið frá Bliki, ið vann bæði á Skálafjørðinum og á Hvalvík.

So fór tað at venda soleiðis, sum tað hevur gjørt seinastu ferðirnar. Blikur tók seg fram, og saman við honum fylgdu Havfrúgvin og Fípan Fagra, sum tær seinastu ferðirnar hava verið við ímillum teir fremstu.

Blikur róði stútt og støðugt, og argjadreingir vunnu greiðan sigur. Teir vóru á málinum eina bátslongd undan næstu kappingarneytunum. Tað var sera tætt í kappingini um næstfremsta plássið. Spógvin tóktist hava ilt við at halda sær frammi í spíssinum. Tað tóktist sum um, at teir ikki funnu aldukambin, sum teir skuldu ríða á. Heldur var tað aldudalurin, sum seyg ferðina úr teimum.

Í staðin vóru tað Havfrúgvin og Fípan Fagra, sum bjóðaðu av í kappingini um næstfremsta plássið. Og hesa ferð eydnaðist tað Fípuni Føgru at vinna kappingina um tey fimm stigini. Fípan var meiri enn eina hálva bátslongd frammanfyri Havfrúnna, sum aftur var eina bátslongd undan Spógvanum. Spógvin vann kappingina um fjórða plássið dygst frammanfyri Sílið, sum bara var minni enn ein skut aftanfyri.

Talan er um rættuliga tætta kapping um næstfremsta plássið. Eingin ivi er um, at Blikur fer at vinna FM. Blikur hevur 26 stig, Havfrúgvin hevur sekstan stig, og Fípan Fagra og Spógvin hava fimtan stig.

# Jarnbardur verður fyrsti meistarin

**Hóast munurin hesa ferð var styttri aftur til Páll Fanga, enn hann hevur verið undanfarnu ferðirnar, so er tað millum lítið og einki, sum bendir á, at nakar fer at megna at taka nakað stig frá Jarnbardi, sum tískil kann vinna FM væl undan Ólavsøku**

6-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*



*Kvinnurnar umborð á Jarnbardi fegnast um fjórða sigurin av fýra møguligum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spurningurin er ikki, um Jarnbardur fer at vinna FM. Heldur er spurningurin, um tað fer at vera nú leygardagin í Vestmanna, ella um tað verður í Sørvági annan leygardag. Tað er eingin spenningur um FM heitið. Skal leitast eftir spenningi, so er hann at finna í, um tað fer at eydnast kvinnunum umborð á Jarnbardi at vinna FM við fullum stigtali.

Møguleiki er sjálvandi fyri, at okkurt púra óvæntað skal koma fyri undir einari av teimum trimum kappingunum, sum eru eftir. Men avrikini og úrslitini higartil hava boðað frá, at tað skal vilja meiri enn illa til, um Jarnbardur ikki skal vinna allar sjey kappingarnar í hesum árinum.

Í Vági var talan leingi um uppvísningsróður. Jarnbardur var fremstur beinanvegin, og hann økti um munin aftur til næstu manningarnar. Eina løtu var fjarstøðan fleiri bátslongdir, tá ið Jarnbardur og so allir hinir fóru skúmandi undan vindinum og á aldukambunum inn eftir Vágs firði.

So var tað, at Páll Fangi, sum leingi hevði togast við og Sølmund fleiri aðrar um næstfremsta plássið, rættuliga gjørdi ein vørr. Kvinnurnar úr Klaksvík evnaðu væl at fáa nyttu burturúr alduni, tær runnu við ferð upp undir liðina á Jarnbardi, og á málinum var munurin frá annars suverena oddabátinum og aftur til Páll Fanga ikki størri enn ein skutur. Frá Pálli Fanga og aftur til Sølmund á bronsuplássinum vóru meiri enn tvær bátslongdir.

Ivaleyst vóru tær aftaná eitt sindur kløkkar umborð á Jarnbardi. Men róðurin sum heild vísti, at nógv skal venda øðrvísi í næstu kappingunum, enn tað higartil hevur gjørt, um tað skal eydnast Páll Fanga ella onkrari aðrari manning at gera enda á sigursrøðini hjá teimum umborð á Jarnbardi.

# Sílið svaraði aftur

**Eftir at alt seinastu vikurnar hevur bent á, at Blikur skjótt skuldi tryggja sær meistaraskapin, er kapppingin nú víðopin aftur**

5-MANNAFØR GENTUR

*Jóannes Hansen*



*Genturnar umborð á Sílinum bastu argjagentum í Vági leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað gekk ikki triðju ferð á rað hjá argjagentum. Eftir sannførandi sigrar á Skálafjørðinum og á Havlvík, megnaði Blikur ikki at vinna á Jóansøkuni.

Tað vóru genturnar umborð á Sílinum, sum syrgdu fyri, at spenningurin í FM kappingini varð varðveittur nakrar í hvussu so er tvær tær næstu vikurnar. Sílið, sum vann á Norðoyastevnu, hevur nú otað seg fram ímóti Bliki. Blikur hevur 23 stig, og Sílið hevur 21 stig. Tað eru bara hesir báðir bátarnir, sum rættuliga kappast um FM heitið.

Firvaldur, sum hevur staðið seg væl higartil í ár, og sum aftur hesa ferð endaði á triðja plássinum - minni enn eina bátslongd aftanfyri Blik - hevur á triðja plássinum í FM kappingini seytjan stig. Tað er neyvan nóg mikið at hótta tveir teir fremstu bátarnar við.

Sílið fekk góðan start, og Sílið megnaði alla tíðina at halda hinar bátarnar aftanfyri seg. Munurin frá Sílinum og aftur til Blik bara øktist, og á málinum var Sílið meiri enn tvær bátslongdir frammanfyri Blik.

Eina góða løtu var kappingin um næstfremsta plássið rættuliga tøtt. Men so megnaði Blikur at skraða seg leysan, og á málinum vóru argjagentur tað mesta av einari bátslongd frammanfyri teir næstu bátarnar.

Firvaldur var í harðari kapping um triðja plássið. Tvøráagentur kappaðust við tær úr Klaksvík. Umborð á Fípuni Føgru hevur tað gingið støðugt rætta vegin, og aftur hesa ferð endaðu tær millum tær fremstu.

Við sigrinum svaraði Sílið teimum uttanfyri ánna aftur, eftir at tær á Argjum høvdu verið bestar í tveimum kappingum. Genturnar umborð á Sílinum var einasta manningin hjá Havnar Róðrarfelag, sum vann á Jóansøku. Enn hava tær møguleika at vinna FM heitið, sum Havnar Róðrarfelag hevur átt tvey tey seinastu árini. Í fjør var tað Drekin, sum vann, og í fyrraárið var tað Sílið. Tað eru tjúgu ár síðani, at Blikur av Argjum fyri fyrstu og higartil einastu ferð vann FM í kappingini millum gentubátar.